

# Góðar pitsur á Sjómansheiminum

BIRITA CHRISTIANSEN OG RÓLANT W. DAM

Týsdagin, ein regnveðursdag í hesi vikuni leitaðu vit okkum oman í pitsaria á Sjómansheiminum, við vón um at fáa ein betri bita. Komin inn í sera hugnaligu hølini, vóru vit víst til eitt borð, og fingu matarskránna latna upp í hendir.

Hetta var í døgurðatímanum, og tá koyra tey við einum serligum »frokosttilboð«, har tú aftrat høvuðsmáltíðini, kann velja ímillum tvey sløg av salati, uttan at hetta kostar tær nakað eyka. Men so er matarskráin minkað mundi. Ein kundi velja millum seks sløg av pitsum, pita kebab og spagetti bolognese. Pita kebab minnir ikki sørt um pita breyð. Í har er grønmeti, dressingur og kebab kjøt. Kebab er væl krydrað kjøt. Spagetti bolognese er ein italskur spagetti rættur. Í stuttum kann ein siga at tað er spagetti við kjøtsós.

Vit bóðu um tvær pitsur, og fóru síðani at eta salatið vit høvdu fingi okkum uppá tallerkin. Tað vóru tvey sera ymisk sløg. Tað eina var tað vælkenda salatið við salatbløðum, agurkum, tomatum. Um ein hevði hug, var eisini Thousand Island dressingur at leggja aftrat. Man kundi kanska hugsað sær, at tað vóru nøkur onnur sløg av dressingi, at velja í millum. Hitt salatið var har aftur í móti ikki serliga vanligt. Høvuðsinnihaldið var kál, eisini var piparfrukt og okkurt annað gott. Hetta var alt í einum oljudressingi, sum ikki var so galin.

Tað var ikki nógv fólk um hetta mundið, og tí kom ein ikki at bíða leingi áðrenn pitsurnar vóru á borðinum. Tænastan var góð, og pitsadaman sum serveraði var fitt og smílandi.

Pitsurnar vóru einastandi. Serliga tí at tær ikki vóru oystar undir í fyllu. Og av tí sama varð botnurin ikki upploystir, men fastur og góður. Fyllurnar ið vóru hakkikjøt og pepperoni, og skinka og ananas vóru eisini sera vælsmakkandi, og í passaligari nøgd, so pitsurnar vóru avbera góðar.

Alt í alt, frálíkar pitsur í sera hugnaligum umhvørvi.

Longdrinks Café

Blues-Trio
v/ Una R. Dobos

Cleopatra

Opið er:

Frá Eydnuni
Leygarkvøldið 1/9 spæla
VESTMENN
til góðan almennan dans
EYDNAN

JOHN's RESTAURANT
Skulu tygum til fótbóltsdyst á Svangaskarði leygardagin
Kom inn á John's Restaurant og eti
Búff a'la Bernaise v/ eplaflísum
Fyri 145,-
Eisini galdandi fríggjadagin
Uttan mat og drekka dugir ... einki
Borðbílegging á tlf./fax 448690
Vit hava døgurða hvønn dag frá kl. 12.00 - 14.00
Opið er sunnudag - hósdag kl. 11.00 til 22.00
Tó fríggjadag og leygardag til kl. 23.00
Vit hava eisini føroyskar Lundar á matseðlinum

Við Sosialinum
Í BÝIN
Sosialurin fer í býin hvørja viku og tú sleppur at fylgja við

-Dag sum nátt-
-skjótt og gott-
BENZIN
DIESEL
KIOSK
-ALT DØGNIÐ-
Skal tú bil hýra so er tað 311234
AUTO 311234



Í Býin

Vit selja allar rættir út av húsinum t.d.

Livandi tónleikur

Déjà-Vu spæla hóskvøldið & fríggjakvøldið

livandi tónleikur
CAFÉ NATÚR
Tlf. 31 26 25

HESA VIKUNA
Hóskvøldið — DJ Marjon Petersen
Fríggjakvøldið — DJ Eyðfinn Sigurstein
80'ara kvøld
ladies night
Leygarkvøldið — DJ Marjon Petersen
FÓTBÓLTUR Á STÓRSKÍGGJA
Café'in hevur opið mán.-frí. 17.00-24.00 og leyg.-sun. 14.00-24.00
Club 20 Café
Írskur búffur v/chips, salat & whiskeysós
EISINI TANN BESTI Í LANDINUM
69,-
Discoteque Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 28
www.club20.fo

fk Matseðilin
Hósdagin 30. august: lambafrikasse
Fríggjadagin 31. august: rivjasteik
Leygardagin 1. sept.: oksasteik
Mánadagin 3. sept.: kjøtfrikadellir
Týsdagin 4. sept.: karrygrýta
Mikudagin 5. sept.: wienarsnitzel
Kostnaður 35,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari ella
Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

Kaggin
Dansur verður í vikuskiftinum
Kaggin
www.kaggin.fo

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Tlf. 424254
Leið Strendur
Leygarkvøldið:
• Tórsh.-Strend. kl. 21.45
• Strend.-Tórsh. kl. 23.00
• Tórsh.-Strend. kl. 04.30 frá City
(Steðga verður við steðgiplássini hjá bussleiðini og bygdaleiðir á vegnum aftur og fram)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Bussarnir: Tlf. 287752

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Tlf. 424254
Leið Vestmanna
Leygarkvøldið :
• Vestm.-Tórsh. kl. 20.50
• Vestm.-Tórsh. kl. 23.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 24.30
• Vestm.-Tórsh. kl. 03.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 04.30 frá City
(Koyrt verður um Kvívík)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Bussarnir: Tlf.286254

Njótið matin í okkara friðsæla og hugnaliga umhvørvi
Hotel Hafnia
Áarvegur 4-10 • Postboks 107
110 Tórshavn
Tel. 31 32 33 • Fax 31 52 50
E-mail: hafnia@hafnia.fo
www.hafnia.fo

Felagið Tórshøll
Hetta vikuskiftið spæla
Flúrar
Hvørt fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld er livandi tónleikur
Bingo verður leygarkvøldið kl. 20.00
Sjavskapping verður sunnudagin kl. 15.00
Nú fleiri ódyrar eindir allar dagar
Felagið Tórshøll
Sverrisgøta 22
Tlf. 31 15 65

Klaksvíkar Klubbi
Tlf. 455681
Fríggjadagin 31. august
• "Fimmari"
• Opið er frá kl. 17.00
UNDIRHALD
Leygardagin 1. september
• Opið frá kl. 22.00
• Dansur frá kl. 24.00 - 04.00
All That Rain spæla

Í Býin
- hvønn hósdag

BýIN
HVØNN HÓSDAG